ítróttur

Nr. 61 • mikudagur • 28. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Allir mans tøkir

**Líkt er til, at Allan Simonsen kann velja millum allan 17 leikararnar, sum eru eftir i landsliðshópinum**

LANDSDYSTUR
*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk úr Moskva*

Allan Simonsen hevði fyrstu ferð allan landsliðshópin til venjingar, tá landsliðið hevði eina stutta venjing mánadagin um middagsleitið. Higartil hevur hópurin til hvørja venjing verið nakað skerdur, men nú tykist tó sum um, at krímið er farið burtur í russiska kuldanum. Sámal Joensen er nú aftur komin fyri seg, Pól Thorsteinsson er endiliga aftur tøkur, meðan Súni Olsen í aðru syftu slapp ígjøgnum passeftirlitið í bæði Brüxelles og Moskva.

Talan var tó ikki um nakra veruliga venjing, tí kuldin í Moskva viðførdi, at tað ikki var gjørligt at finna ein grasvøll, har fótbóltur kundi spælast. Ístaðin varð vant á einum graslíkisvølli, men sum skiltist á leikarunum, var hetta tó ikki meira enn næstbest. Onkur teirra helt, at tað mest av øllum líktist einari betongflatu, har eitt tunt teppi varð lagt á.

Venjingin var so eisini hareftir. Lítið av bóltspæli, meðan størri denturin varð lagdur á at fáa ferðamøðina arbeidda úr kroppinum.

### Ein á toppinum

Sostatt tykist tað sannlíkt, at Allan Simonsen kann taka allar sínar leikarar við í telvingina, tá hann fer at hugsa um, hvussu liðið skal síggja út, tá farið verður á vøllin.

Einasta lítla ivamálið tóktist vera Øssur Hansen, sum hevði nakað nógv vatn í beininum. Hann hevði tó fingið at vita, at talan helst ikki var um skaða av nøkrum slag, so við eitt sindur av hvíld skuldi hann verið førur fyri at luttikið.

Spurningurin er so, hvussa Allan Simonsen velur at blanda kortini, men tað tykist tó soleiðis, a talan í útgangsstøði verður um eina heldur meira verjukenda føroyska uppstilling.

Akkurát, hvussu hendan verður, er sjálvandi ilt at siga, men tað tykist verða talan um eina 5-4-1, har Jákup Mikkelsen verður fremsta valið í málinum. Har verjan verður mannað við Øssi Hansen og Pól Thorsteinssyni í borðunum, meðan Johan Byrial Hansen, Óli Johannesen og Hans Fróði Hansen skipa miðverjuna. Á miðvøllinum verða so Sámal Joensen, Fróði Benjaminsen, Julian Johnsson og John Petersen, meðan Kurt Mørkøre verður einsamallur maður á toppinum. Sum sagt ein í útgangsstøði 5-4-1, men sum kann broytast til 3-6-1, alt eftir hvussu langt niðan á vøllin síðubakkarnir fara.

Liðskipari verður væntandi Óli Johannesen, sum eisini hevði armbindið á arminum, eftir at Todi Jónsson noyddist av vøllinum í Luksemburg.

Seinast Allan Simonsen royndi seg við einum áleypara var, tá Føroyar í fjør taptu 5-1 í Sveis. Úrslitið tað ferðina var tó ikki so nógv úrslit av eini miseydnaðair spælskipan. Heldur var tað tann sannroynd, at samlaða føroyska avrikið var nakað væl undir miðal.

### Tveir úti

Um so er, at talan verður um omanfyrinevndu uppstilling, so merkir hetta samstundis, at tveir av ungu leikarunum, sum annars gjørdu nógv um seg í Luksemburg, ikki vera við frá fyrsta bríksli.

Talan er um Christian Høgna Jacobsen og Jákup á Borg, og ivaleyst verður hetta gjørt, tí Allan Simonsen í størri mun hevur tørv á royndum leikarum, nú talan er um dyst móti Russlandi. Sjálvur hevur landsliðsvenjarin eisini fleiri ferðir víst á, at tað ræður um ikki at skunda ov nógv undir ungu leikararnar. Hann hevur eisini sínar egnu royndir í so máta, so tað tykist á ongan hátt soleiðis, at venjarin hevur mist álitið á ungu monnunum.



*Mánadagin og týsdagin sluppu leikararnir eisini at hyggja seg um í russiska høvuðsstaðnum*

# Russar skulu vinna

**Eftir køvisliga javnleikin móti Slovenia, er kravið til russiska liðið ein sigur á Føroyum**

LANDSDYSTUR
*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk úr Moskva*

Tað tykist ikki, sum um dysturin móti pinkulinginum, Føroyum, er nakað, sum fær vanliga russaran til at leggja nakað serligt í fótbóltin. Fólk á gøtuni vita valla av, at fótbóltsdystur er á skránni, og heldur ikki verður roknað við, at nakað serligt av áskoðarunum verður til dystin.

Sjónvarpsstøðin, sum eigur rættindini til dystin, hevur eisini gjørt av, at teir ikki vilja varpa dystin út, og kanska viðførir hetta, at talið av áskoðarunum kvinkar nakað uppeftir, men ikki kann roknast við fleiri enn 20.000 áskoðarum á ristastóra leikvøllinum.

### Nøgdur við sigur

Ein av stjørnunum á russiska liðnum, Alexander Mostovoi, verður í bløðunum endurgivin fyri at siga, at talan als ikki verður um nakran léttan dyst.

- Eftir javnleikin móti Slovenia verða vit noyddir at vinna. Tí eri eisini nøgdur, um talan verður um ein tepran 1-0 sigur, sigur Mostovoi, sum dagliga spælir við spanska Celta Vigo.

Ítróttarblaðið, har hann verður endurgivin, tykist tó rokna við, at talan allar helst verður um ein hampuliga tryggan føroyskan sigur. Skrivað verður, at føroyingarnir allar helst eru komnir til Russlands við einum endamáli, og tað er verju.

Uttan stórvegis hóvasták verður staðfest, at Føroyar fara at spæla við níggju monnum í verjuni, meðan ein áleypari verður á toppinum. At Todi Jónsson ikki er við, tykist blaðið als ikki at hava fangað.



# Bara fýra eru eftir frá 1995

**Tað var um reppið, at føroyingar komu á odda, tá landsliðið fyrru ferðina vitjaði í Moskva**

FÓTBÓLTUR



*Øssur Hansen er ein av teimum fýra, sum var liðnum í 1995 og sum í dag aftur skal á vøllin*

Tá føroyska landsliðið í kvøld fer inn á olympiska leikvøllin í Moskva verður talan um ikki heilt ókendan vøll fyri summar av spælarunum. Landsliðið hevur nevniliga eina ferð áður verið í Moskva og spælt. Tað var leygardagin 6. mai í 1995. Talan var um EM undankappingardyst, og Russland vann 3-0.

Føroyska liðið sá soleiðis út ta ferðina: Jens Martin Knudsen, GÍ – Henning Jarnskor, GÍ (Djóni N. Joensen, NSÍ, 70), Janus Rasmussen, GÍ, Óli Johannesen, TB, Jens Kristian Hansen, B36, Øssur Hansen, B68 – Allan Joensen, KÍ, Kurt Mørkøre, B68, Magni Jarnskor, liðformaður, GÍ – Todi Jónsson, Lyngby, Jens Erik Rasmussen, Horsens.

Á beinkinum uttan at koma á vøllin vóru Kaj Leo Johannesen, HB, Harley Bertholden, KÍ, Tummas Eli Hansen, B36 og Súni Fríði Johannesen, B68.

Tað verður ofta tikið til, at Allan Simonsen heldur seg til somu spælararnar. Tað er nógv um hetta, men samstundis er tað ein veruleiki, at útskiftingin hevur verið stór síðani Russlands ferðina í 1995.

Bara fýra av spælarunum, sum vóru við ta ferðina – UEFA ásetingarnar søgdu tá, at sekstan spælarar skuldu vera í ferðalagnum, meðan tær nú siga, at talið kann vera átjan – eru við í Moskva hesa ferð. Teir eru Jens Martin Knudsen, Óli Johannesen, Øssur Hansen og Kurt Mørkøre.

### Tveir stórar møguleikar

Ta ferðina vóru 9.500 áskoðarar á stóra olympiska stadion í Moskva. Føroyingarnir kundu teljast á aðrari hondini. Russland fekk ikki hol á fyrrenn í 51. minutti, og so skoraðu teir aftur í 72. og 79. minuttunum.

Føroyska liðið stóð seg sera væl í 1. hálvleiki. Verjan var tøtt, so russararnir høvdu ilt við at spæla seg til málmøguleikar. Teir komu alt longri fram á vøllin, og í tveimum umførum høvdu føroyingar stórar møguleikar at fáa mál.

Í tí fyrra førinum varð Jens Erik Rasmussen spældur leysur. Við einum verjuspælara í hølinum, kom hann móti Stanislav Cherchesov, sum var málverji. Hesin kom út ímóti, Jens Erik dró eitt vet til vinstru, fintaði skotroynd, og tá málverjin tveitti seg niður, lyfti føroyski álopsmaðurin bóltin upp um hann. Men ólukkutíð tók bólturin í knæið á málverjanum og fór stiklandi dygst skeivu megin stólpan.

Í tí seinna førinum vóru Óli Johannesen og Todi Jónsson brádliga tveir ímóti einum á russisku hálvuni. Óli hevði bóltin mitt fyri, meðan Todi fór í vinstra borð og dró verjuspælaran við sær. Óli kundi havt rikið inn í brotsteigin og roynt ímóti málinum. Men hann valdi heldur at spæla til Toda, sum megnaði at koma í skotstøðu í brotsteiginum. Vinkulin var spískur, og heilt uppi í málhorninum fekk málverjin bent bóltinum til hornaspark.

### Vóru á odda

Russarar vitjaðu á Svangaskarði 6. september í 1995. Teir vunnu 5-2, men teir 1.852 áskoðararnir og alt Føroya fólk kemst ivaleyst við løtuna, tá Todi Jónsson í 55. minutti skoraði til 2-1. Henning Jarnskor hevði í 12. minutti javnað til 1-1. Russarar fingu mál í 10., 60., 65., 84. og 87. minuttunum.

Ta ferðina sá liðið soleiðis út: Jens Martin Knudsen, GÍ – Henning Jarnskor, GÍ, Tummas Eli Hansen, liðformaður, B36 (Allan Joensen, KÍ, 81.), Óli Johannesen, TB, Janus Rasmussen, GÍ, Øssur Hansen, B68 – Julian Johnsson, HB, Kurt Mørkøre, SIF Ålesund, Jens Kristian Hansen, B36 – Jan Allan Müller, Sumba/VB (Jens Erik Rasmussen, TB, 72), Todi Jónsson, Lyngby

Á beinkinum uttan at koma inn vóru Jákup Mikkelsen, Herfølge, Jan Dam, HB og Magni Jarnskor, GÍ.

Seks spælarar eru í Moskva hesa ferð, og sum vóru í hópinum ta ferðina. Teir fýra, sum vóru við í Moskva fyri seks árum síðani, og sum aftur eru við hesa ferð, vóru allir á liðnum á Svangaskarði. Um liðið í kvøld verður umleið tað sama, sum tað var í Luksemburg, so vera tríggir spælarar á liðnum aftur hesa ferð: Óli Johannesen, Øssur Hansen og Kurt Mørkøre.

Vit kunnu bara staðfesta, at sjálvt um tað verður spælt við so at siga sama liði hvørja ferð, so hava broytingarnar verið stórar í seks ár.

**jh**

# Óli fer um teir hálvt hundrað

**Tvørámaðurin í Hvidovre verður í kvøld triði føroyski landsliðsspælarin í fótbólti, sum hevur umboðað føðilandið hálvt hundrað ferðir**

FÓTBÓLTUR



*Óli Johannesen fer í kvøld at umboða føðilandið fyri 50. ferð í altjóða skrásettum landsdysti.*

Eitt sindur av einum hátíðarhaldið verður tað hjá Óla Johannesen á olympiska leikvøllinum í Moskva í kvøld. Gongst alt eftir ætlan, og Óli Johannesen verður í sín i vanligu ódn í miðverjuni, so fer Óli hann í kvøld at umboða føðilandið fyri 50. ferð í altjóða skrásettum landsdysti.

Tað eru næstan níggju ár síðani, at Óli fyrstu ferð kom á landsliðið. Tá Ísrael og Føroyar spældu 1-1 á Svangaskarði 5. august í 1992, spældi Óli 22 minuttir. Hann loysti Allan Mørkøre av. Tann dysturin var tann 18. altjóða skrásetti landsdysturin. Í kvøld er dystur nummar 72 á skránni. At Óli í kvøld verður skrásettur fyri dyst nummar 50 boðar frá, at hann hevur verið sera drúgvur, síðani hann fyrstu ferð kom á liðið.

Einasta ferðin at Óli ikki hevur verið afturvaldur síðani fyrstu ferðina, hann var á landsliðnum, var í næsta dystinum. Føroyar taptu 6-0 í Wales, og Óli sat á beinkinum allar 90 minuttirnar. Síðani spældi hann vuið í 31 dystum upp í slag. Í øllum dystunum spældi hann alla tíðina uttan í tí eina. Tað var í vinardystinum ímóti Noreg 11. august í 1993 (í dysti nummar 25). Føroyar taptu 7-0, og Óli spældi bara fyrstu 31 minuttirnar.

At vera við í 31 dystum upp í slag er føroyskt met, og metið verður ikki tikið nógvu teir næs tu dystirnar. Samanhangandi dystarrøðin hjá Óla Johannesen kundi havt verið uppaftur longri. Men tá landsliðið 4. juni í 1998 tapti EM undankappingardystin í Estlandi 5-0, var Óli ikki við. Hann var upptikin av próvtøku á læraraskúlanum.

Tá landsliðið tíðliga á árinum í fjør spældi tveir NM dystir í Spania, sat Óli Johannesen á beinkinum í fyrra dystinum, sum var ímóti Finnlandi. Hann var skaddur, men var nóg væl fyri at spæla ímóti Íslandi. Tað bar ikki til hjá Óla at vera við í venjingardystinum ímóti Liktinstein í apríl í fjør.

Undan 50. landsdystinum hevur Óli Johannesen, sum varð liðformaður, tá Todi noyddist at fara av vøllinum leygardagin, skorað eitt landsliðsmál. Tað skoraði hann í 2–2 vinardystinum ímóti Estlandi á Kýpros 24. februar 1996.

Á landsliðnum hevur Óli Johannesen umboðað fýra feløg. Fyri barndómsfelagið, TB, hevur hann spælt 25 landsdystir, og fyri B36 hevur hann spælt 14 landsdystir. Tíðarskeiðið í AGF spældi Óli átta landsdystir, og í kvøld fer Óli at spæla fyri triðju ferð á landsliðnum, síðani hann flutti til Hvidovre.

### Triði í røðini

Óli Johannesen er triði føroyingurin, sum røkkur hálvt hundrað landsdystum. Hinir báðir eru Jens Martin Knudsen og Allan Mørkøre. Jens Martin, sum í alt hevur spælt 52 landsdystir, fór um teir 50 í Liktinstein 26. apríl í fjør. Allan Mørkøre, sum í alt hevur spælt 53 landsdystir, var fyri 50. ferðina á landsliðnum, tá Danmark var á Tórsvølli 16. august í fjør.

Tað er neyvan langt við síðuna av at rokna við, at tað fer ikki at ganga so rúm tíð, áðrenn Óli Johannesen fer at hótta teir báðar omanfyri nevndu. Allan Simonsen tykist hava gjørt av, at Jákup Mikkelsen er fyrsta valið ímillum stólparnar. Tað vil siga, at Óli togar inn á Jens Martin Knudsen hvørja ferð, hann er á liðnum. Allan Mørkøre er ikki við í Russlandi, tí hann er skaddur. Tíðin fer at vísa, um hann verður eins drúgvur á landsliðnum, sum Óli Johannesen tykist vera.

Nógv bendir á, at Øssur Hansen verður fjórði landsliðsmaðurin, sum fer at røkka hálvt hundrað landsdystum. Í kvøld er hann á landsliðnum fyri 44. ferð. Øssur, sum ímóti Luksemburg spældi sera sannførandi og rutinerað, og Todi hava leingi verið javnir í dystartali.

**jh**